FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 20.06.16**

**Á fundi:** Erika Anne Hayfield, adjunktur (forkvinna)
Turid Christophersen, lesandi (næstforkvinna)
Jens Christian S. Justinussen, útbúgvingarleiðari
Bárður Larsen (útbúgvingarleiðari)
Ingi Jacobsen, lesandi
Annika Soll, lesandi
Sigrid Joensen, skrivari

1. **Búskaparfrøði útbúgving**

   Lestrarráðið hevur fingið fundarfrágreiðing frá varadekaninum frá fundi millum rektara, varadekan og útbúgvingarleiðara fyri Búskaparfrøði. Niðurstøðan varð, at Búskaparfrøði útbúgvingin varveitir bygnaðin við 7,5 ECTS. Tó so bindur útbúgvingarleiðarin seg til at bjóða øll skeið eisini sum 10 ECTS skeið, sum SSD (t.e. varadekanur í samráð við Lestrarráðið) metir verða áhugaverd/viðkomandi fyri hini lesandi á deildini.

   Forkvinna (í samráð við Lestrarráðið) umrøður við varadekanin hvørji skeið talan kann verða um og fráboðar sum skjótast til útbúgvingarleiðaran í Búskaparfrøði. SSD kann gera loypandi tillagingar í teimum skeiðnum, sum skulu bjóðast sum 10 ECTS, men skal útbúgvingarleiðarin hava hetta at vita í góðari tíð. Sum útgangsstøði skal varadekanur tó senda útbúgvingarleiðaranum ein lista við teimum skeiðum, sum vantandi vera tey, sum SSD metir verða viðkomandi og áhugaverd at bjóða út sum 10 ECTS.

   Lestrarráðið vantar framvegis at síggja námsskipan og skeiðslýsingar. Men við verandi kunning er Lestrarráðið samt um at fyribils góðkenna útbúgvingina í Búskaparfrøði. Endalig góðkenning fyriliggur tá námsskipan fyriliggur.

   Góðkenningin er treytað av, at umbidnu skeiðini verða boðin út sum 10 ECTS.

   Forkvinnan orðar skriv/aftursvar til varadekanin.

2. **Góðskrivingar:**

   Undangóðkenningin hjá N.N. er góðkend.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

3. **Skeiðslýsingar (GH):**

- Skeiðslýsingin *Praksislæra* (masterlæra V2016) er góðkend. Enska heitið vantar. Forkvinnan skrivar til útbúgvingarleiðaran um hetta.
- Skeiðslýsingin *Evnisrættað synopsa á Master-læru* góðkend við fyrivarni. Enska heitið vantar. Forkvinnan skrivar til útbúgvingarleiðaran við fyrivarni.
- Skeiðslýsingin *Master Advanced Methodolgy in Master learning* góðkend. Læruútøkan, viðmerkingar til etik. Forkvinnan skrivar til útbúgvingarleiðaran við viðmerking.